**Hegn til traðarbrúk.**

Lóg um hegn er, ***Lov for Færøerne om Hegn og Markfred frá 18 maj 1937 við broytingunum, Ll.25 31/3 –49 ( § 15 ) og Ll. 30 17/3 – 51 ( §44 )***
Fyri traðirnar hjá býráðnum verður kravt:
**Stikur** : Skula vera haldgóðar trýstviðgjørdar (impregneraðar) helst ***rundar***stikur, tjúgd minst 50 mm. Enda – og hornastikur eiga at vera 70 mm í tvørmát. Longdin eigur at vera minst 1.8 m, tí at styttri stikur kunna ikki sláast so langt niður at nóg fast verður har sum tað er bleytt undir. Stikur kunna fáast við fleiri ára rotváttan. Vánaligar stikur eru á marknaðinum, og eru tær ofta skeivar og við nógvum kvistum.

**Hegn :** Skal vera av dygdargóðum galvaniseraðum jarntráði, fyri útsjóndina so helst ikki grønt, yvir– og undirtráðurin minst **3 mm tjúkkir,** og minst **100 cm** høgt. Meskarnar mugu ikki vera størri enn **16 cm.** Træðrinir eru vanliga antin snaraðir saman, ella læstir saman við einum knúti. Mett verður at **tráðknúturin** heldur betri. Hegn hevur eina rangu og eina rǽttu, og eisini sæst hvat upp ella niður er á einum hegni, tí vanliga eru smærri meskar í neðra.

**Uppseting:** Hegn eru sjáldan nakað prýði í landslagnum, og tí er neyðugt at hegnini eru so væl uppsett sum møguligt. Fátt er so ljótt sum illa uppsett hegn. Býráðið miðar ímóti at hegn og traðir skula vera eitt prýði og ein fyrimynd fyri røkinskapin í býnum. Ikki er óvanligt at síggja traðir við fleiri løgum og fleiri sløgum av hegni, gomul rusta hegn, skeivar, brotnar og rotnar stikur, hornastikur klýggjaðar við stórum steinum, skrástívarar á hvørjari stiku bæði út – og inneftir, skrástívarar ella jarntráðabardunir út í hagan o.s.fr..
*Fyri at hegn skula standa gott er neyðugt at stikurnar standa í beinari linju millum hornastikurnar*. At hornastikurnar og stikurnar hvørjumegin við standa fastar. Hetta kann gerast við at grava hol og kíla/stúgva stikurnar fastar við gróti/eyri, ella stoypa. Fyri at sleppa undan at hornastikurnar leypa uppúr, er at negla fast í stikurnar næst horninum, so at spennið stendur á teimum , og ikki so nógv á sjálvari hornastikuni, sí skitsu. Har sum hella er undir, verður neyðugt at bora og seta 5/4" galvaniseraði rør ístaðin, klænri rør bogna ov lætt.
Neyðugt er at spenna gott, men tað kann eisini spennast ov nógv.
Negling av kongum eigur at gerast so at hegnið skal kunna *" liva í konginum, "* uttan tó har sum sett verður fast. Hegn styttist og leingist eftir sum hitin er. Týðuliga sæst at hegn *rustar illa* eftir stuttari tíð har sum galvaniseringin er brotin , av tí at kongarnir eru smíðaðir av makt inn í stikurnar.
Undir hegninum eigur allastaðni at vera í minsta lagi *5 cm fríhædd.* Í giljum og á heyggjum verður annahvørt laðað uppundir, ella grivið undan. Vatnræsir eiga at leiðast undir hegn í rørum , ið eru ivaleysa víð, í minsta lagi 15 cm. Í erva verður spentur ein slættur tráður, í minsta lagið 3mm tjúkkur, ella píkatráður, so hæddin á hegninum er 1.20 m yvir jarðildi. Um píkatráður verður settur eigur hann at vera á innsíðuni av hegninum, og er bert neyðugur har sum stórdýr kunna koma til hegni. Ross eru ikki serliga bangin fyri píkatráði. Har hjálpir bert el–hegn.
Portur og stigar kunna gerast sambært hjálagdu tekningum.
**Mælt verður annars til at hyggja eftir hegnum,sum kommunan sjálv letur seta upp.**
Hegn – og vatnsýnisnevndin verða fráboðað um at avgera ósemjur um hegn .

traðarumsjónin




**UPPSKOT TIL HEGNUPPSETAN Í HORNI**

**býargartnarin feb 1994**